ATLANTIC AIRWAYS
SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**
Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 23:
Leiðin til Keypmannahavn
8 síður við spennandi tilfarið um summar

# **Almenn** ferðsla er lættast

**Ein stórur fyrimunur við Keypmannahavn, er, at óansæð, hvar tú skalt, so ber altíð til at nýta antin ein bussa ella eitt tok, ið ikki er alt ov langt burturi. Tættari sentrum tit halda til, lættari er at nýta hesi flutningstól**

Keypmannahavn skal skjótt skipa fyri stórari veðurlagsráðstevnu, og í mun til nógvu bilarnar í býnum er høvuðsstaðurin í Danmark ikki heilt klárur, men tá tað kemur til mongdina av almennari ferðslu. Prísinum av hesum somu og títtleikanum, so er Keypmannahavn eitt paradís. Eitt veruligt paradís fyri øll, sum ikki tíma at nýta bilin.

Tit sita á hotellinum. Tit hava lagt til rættist, at nú skulu tit fara ein lítlan túr út í Fields. Hvussu skulu tit nú gera. Skulu tit ringja og spyrja nær tokið koyrir? Skulu tit taka ein taksabil? Skulu tit kanna á rejseplanen, nær tokið koyrir? Sjálvandi ikki. Tit gera á besta føroyskan hátt. Tit lata tykkum í. Ganga yvir til hovebanegården ella nærmastu tokstøð, so er heilt víst onkur innan næsta korterið, sum tit sleppa við til Ørestad, har Fields jú liggur.

Skulu tit tó gera longri, óvanligari túrar, so er eitt sera gott ráð at nýta www.rejseplanen.dk, har tit fáa neyvt at vita, júst hvussu tit skulu gera, uttan yvirhøvur at hugsa. Tit kunnu enntá skriva navnið á staðnum tit skulu skeivt. Tí tit fáa framvegis at vita, hvar tit skulu ganga, hvar tit skulu nýta buss og hvar tit skulu nýta tok.

Hinvegin er ein lítil vansi, at har fleiri møguleikar eru at finna eina loysn, so tekur rejseplanen ikki altíð tann skjótasta, men fram koma tit heilt víst, samstundis, sum tit ikki nýta bil og fara frægari við umhvørvinum. Ikki løgið, at Keypmannahavn skal hýsa veðurlagsráðstevnu.



**Hovedbanegården í Keypmannahavn er staðið at byrja sína ferð. Um hon so er til Fields ella Moskva**

**Rejseplanen.dk er heimasíða, har tú kanst biðja um upplýsingar um nærum allar ferðir, ið verða gjørdar eftir jørð**


Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við teldupostí
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo